# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Syrgilig lagna

Nú øll vóru so fegin um hepnu bjargingina av Atlantic Navigator, sum fór á land herfyri, kom tað sera dátt við – eitt antiklimaks við lít - at fáa tíðindini um, at skipið gevst við svartkjaftaveiðuni í Føroyum fyri at fara til Suðurpólin at veiða krill ístaðin.

Nú tað serstakliga vóru útlendskir íleggjarar, sum stóðu aftan fyri hesi ætlan, kunnu vit sjálvandi lítið og einki gera fyri at forða eini slíkari støðu. Kapitalurin ræður. Føroyingar hava verið partur av hesi ætlan, men sita so ikki við meirilutanum. Tað er eingin loyna, at mong í Føroyum hava verið ómetaliga glað fyri fyrst Næraberg og nú Atlantic Navigator. Skipini hava verið ein frískligur íblástur í føroyska fiskivinnu og hava verið eitt gott og spennandi arbeiðspláss fyri tey hundraðtals fólkini, kvinnur sum menn, ið hava verið við.

Vit hava sum blað gjørt nógv burtur úr verkætlanini ikki minst tá skipini eru komin fullastað til lands ella eru farin nýggjan túr við glaðum ungum føroyingum. Vit hava sæð hetta skip sum ikki bert flaggskipið í føroyska fiskiflotanum men eisini sum skúlaskipið, har ungfólk bráddliga aftur fingu hugin til sjógvin. Skipið hevur so eisini troytt eitt fiskaslag til fulnar – tvs. til foredlaða matvøru – har fiskurin í stóran mun áður er farin til fiskafóður.

Vit kenna ikki smálutirnar, hví avgerð varð tikin um at gevast. Um talan er um eina veiðu og framleiðslu, sum vísti seg ikki at vera lønandi, so er tað ein ærlig søk. Men er orsøkin tann, at eigararnir heldur vilja brúka skipið at veiða krill á suðurhøvum, so má tað sigast at vera stórt spell og eitt slag í andlitið, nú mong hildu, at skipið var komið fyri at verða verandi.

Føroysku stigtakararnir til hesa verkætlan hava lagt eitt sera stórt arbeiði í hana og hava veruliga verið við til at bróta upp úr nýggjum. At brúka svartkjaftin til dýra matvøru heldur enn til bíligt fiskafóður er nakað, sum mong fegnast um. Nú vendist so ikki við aftur. Norsku oddamenninir hava talað. Neyvan eru føroyingarnir aftan fyri verkætlanina fegnir um hesa avgerð. Tað má tó sigast at vera rættiliga ørkymlandi, tá grundgevingin fyri at gevast verða søgd at vera tann, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ætlar at seta fleiri nýggjar lógir í verk, sum fara at gera íløguna í surimiframleiðslu minni lønandi og áhugaverda. Hetta ljóðar sum undanførsla, sum nakað, ið er uppfunnið fyri at rættvísgera eina avgerð, sum langt síðni er tikin við tí fyri eygað at brúka skipið aðrastaðni, og ikki orsakað av møguligum komandi lógarbroytingum í Føroyum.

Áhugavert vildi verið at fingið øll kort á borðið, so vit sóu, hvør veruliga orsøkin var til, at hundraðtals føroyingar so bráddliga mistu sítt arbeiði og samfelagið misti stórar inntøkur. Vit hava ikki svarið. Kanska onnur hava tað.

**Sosialurin**

# Fiskivinnan anno 2007

**SAKARIS ZACHARIASEN**

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, er loksins vaknaður úr dvala og er komin við einum uppskoti á ting, ið hevur til endamáls, at øll fiskiloyvini hjá tí føroyska fiskiflotanum skulu inndragast seinast í 2018.

Hetta hevur skapt ótryggleika í fiskivinnuni og annars hjá øllum teimum, ið hava áhuga í hesi vinnu, t.d. bankum, reiðarum, eigarum og í vinnuni yvirhøvur. Ein av fylgjunum er, at nú noyðist Atlantic Navigator at gevast, og grundgevingin er, sigur Hanus Hansen reiðari, at ótryggleiki valdar viðvíkjandi fiskiloyvunum hjá skipinum.

Hetta er væl skiljandi, tí í uppskotinum liggja ongar visjónir, eingir møguleikar, einki nýtt, eingir karmar, ella aðrir neistar, ið skulu geva íblástur til íleggjarar í eina nýggja framkomna føroyska fiskivinnu.

Møguleikar, ið birta undir framburð og áræðið, sum sjálvsagt er ein fyritreyt fyri, at vinnan skal trívast, mennast og verða lív lagað. Tey størru skipini og kanska mest partolaraflotin, er í dag samansettur soleiðis, at uttan fiskiloyvi eru hesi skip 0 kr. verd á pappírinum. Tey eru stutt sagt ein so vánalig søluvøra, at eingin marknaður finst fyri hesi skip, so einfalt er tað. Men so leingi tey hava einkarrættin til fiskiríkidømið undir Føroyum, er hesin parturin av flotanum eitt reint 24 karat gullegg fyri tey, ið sita á loyvinum.

Eg eri púra samdur við fiskimálaráðharranum í, at øll fiskiloyvini skulu inndragast sum skjótast, men tá tað er sagt, eri eg ikki samdur við einum komma í restini. Uppskotið byggir í botn og grund á eitt langt forboð, ið skal forða „spekulantum" at arbeiða frítt.

Tað, Bjørn Kalsø ikki skilir er, at spekulantar eru ikki bara teir, ið eiga kapitalin. Spekulantar spekulera eisini í, hvussu ein nýggjur floti, og fiskiídnaðurin á landi eigur at verða samansettur í framtíðini, soleiðis at sum mest fæst fyri hvørja krónu, ið verður latin í íløguna. T.d. er eingin karmur orðaður fyri einari møguligari nýggjari samanseting av fiskivinnuni, bæði á sjógvi og landi. Ein karmur, ið gevur vinnuni fríari ræsur at kanna um t.d. møguleikar skuldu ligið í, at virka rávøruna meiri umborð, so at virkini á landi høvdu møguleika at leypa tey fyrstu liðini um í framleiðsluni, so virkini kundu lagt seg longur upp í framleiðsluketuna, og harvið eisini nærri brúkararnar, sum jú er tann í betalir alt gildið í seinasta enda.

Tað er einki at taka seg aftur í, at fiskivinnan á sjónum einki er broyt tey seinastu nógvu árini. Vit hava fingið nýggj skip, men bygnaðurin er einki broyttur. Við verandi lógarskipan kunnu vit ikki gera annað, enn skræða garnarnar úr fiskinum, og leggja hann at rota eina viku ella so í lastina, fyri síðani at selja virkinum rávøru, ið er vorðin gomul, fyri ikki at siga ónýtilig.

Vit standa fyri øgiligum broytingum. Oljan er vorðin ovurhonds dýr, dálkingin er ræðandi, og her toppar okkara nýtsla. Ja vit liggja tíverri ovast í verðini, tá talan er um dálking, og tað er ikki akkurát nakað vit tíma at reypa okkum av.

Tey flestu eru á einum máli um, at tað er avgjørt neyðugt við einum nýggjum bygnaði í fiskivinnuni, men hvussu hetta skal gerast, eru ongar klárar útmeldingar komnar um. Vit hava sæð, baði í loft og fjølmiðlum, og hoyrt frá nógvum ungum fólkum, nógv góð og fín uppskot um rationaliseringar, sum allar hava til endamáls at minka um útreiðslurnar og útlátið av $CO_2$. Tað skal nú ikki so nógv fantasi til at skilja, at ein góður háttur at minka um útlátið, er at minka um oljunýtsluna.

Fyri at minka um brennievni, er neyðugt at løgtingið broytir lógina um vinnuligan fiskiskap grundleggjandi. Vinnan má í framtíðini fáa møguleikar at tillaga seg tær nýggju tíðirnar vit liva í, soleiðis at sum mest fæst fyri hvørja krónu, ið latin verður í vinnuna. Hetta er ikki møguligt við verandi skipan. Vit brúka í dag ovurhonds stórar upphæddir til sigling, transport av rávøru eftir landavegnum, óneyðugar goymslur á landið og flyting av vøruni til útheimin, bara fyri at vísa á nøkur ítøkilig dømir, ið kosta risa upphæddir, sum stórt sæð eru lættar at skera burtur.

Tá eg sjálvur havi siglt við flakatrolara, og havi sæð teir møguleikar, sum liggja í hesari vinnuni, er tað undrunarvert at hugsa sær, hvussu primitiv vit í grundini eru. Fyri mær sær tað út sum um at politikararnir ikki skilja, hvussu veruleikin í botn og grund hongur saman. Nú tað er meldað út, at Atlantic Navigator, eftir juni ella august, ikki er partur av okkara flota longur, er hetta ikki annað ein katastrofa fyri okkara land. Gott og væl 200 arbeiðspláss verða skrødd burtur, og harvið grundarlagið hjá nógvum ungum føroyingum, sum settu sína vón til hetta arbeiðsplássið.

Tí má tað verða eitt krav til okkara myndugleikar, at okkurt eigur at verða sum skjótast, fyri at okkara eftirkomarar skulu hava eina framtíð, eisini innan fiskivinnuna. Politikararnir mugu síggja í eyguni, at neyðugt er við stórum broytingum, og eiga at opna fyri møguleikum hjá vinnuni, soleiðis at meira kann gerast við fiskin umborð á skipinum. Støðan er jú tann, at vit kunnu bara fiska eina ávísa nøgd, og tí er neyðugt at fáa sum mest burtur úr, í pengum og arbeiðsplássum, tað sigur jú seg sjálvt, og kann ikki vera so torfført at skilja.

Eg kann fáa ilt í eitt vist stað, tá ið man hoyrir, hvussu ilt okkara fjórða statsmakt far í sama stað sum eg, tí Strandferðslan skal flyta til Suðuroyar. Men tá gott og væl 200 arbeiðspláss verða skrødd undan okkum, tí umsitingin í fiskimálaráðnum, ikki skilir, at nú er hóttafall fyri durum, eru fjølmiðlarnir líkaglaðir.

Vit vilja so fegin vera stór, og fáa Clinton hendaveg, og vit eru tjóðskaparsinnaðir, ja stórt sæð er eingin munur á tjóðveldinum og sambandinum, tá saman um kemur, bara vit fáa loyvi at gvagga víðari í dunnuhylinum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.